## DAGSINS MEINING

# Tvær góðar avgerðir

Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Titu Vinther fyri hennara slóðbrótandi arbeiðið innan vevlist í Føroyum. Vit venda aftur til hesa frálíku avgerð í morgin. Annars fegnast vit her og nú um, at stóri gamli maðurin í føroyskari bókaútgávu, Emil Juul Thomsen nú endiliga verður heiðraður av teimum almennu Føroyum. Heiðursgáva Landsins verður latin einstaklingi, felagið og fyritøku – t.d. bókaforlagi, tónlistaforlagi ella kóri – sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella hava havt serstakan stóran týdning fyri føroyska list og/ella føroyska mentan og mentanarlív.

Nevndin hevur gjørt tilmæli til landsstýrismannin um at lata Emil Juul Thomsen heiðursgávu landsins fyri 2005 og sigur hon í grungeving sínari: ”Heiðursgáva Landsins verður latin Emil Juul Thomsen fyri hansara slóðbrótandi arbeiði fyri føroyskar bókmentir og bókaútgávur. Emil Juul Thomsen hevur við forlagi sínum “Bókagarði” seinastu fjøruti árini givið út stórt og ókent tal av gomlum føroyskum verkum í nýggjum hami. Forlagið stendur sum útgevari av øllum Varðunum, bókini um kirkjubømúrin og Mikines, William Heinesen á føroyskum, Heðini Brú og Martin Joensen í nýggjum útgávum, nýprent av bókum Regins í Líð, og bøkur eftir Jóannes Rasmussen og Hanus Debes Joensen. Vit finna bøkur um list eftir Broby Johansen, vit finna týddar altjóða klassikarar o.s.fr. Eitt hitt seinasta bragd Emil Juul Thomsens er útgávan av mikla verkinum “Føroya Kvæði”. Tá ið Emil fylti 90 ár 27. november í 2005 lýsti nevndin í Varðanum Emil soleiðis “Maðurin, sum gjørdist kendur fyri at endurútgeva Varðan, er sjálvur vorðin ein varði í føroyska samfelagnum”. Heiðursgávan verður latin Emili fyri lívsverk hansara at geva út og harvið varveita ein stóran og týdningarmiklan part av mentanararvi okkara.

Tað at geva út bøkur er eitt ótakksamt starv. Emil, sum hann vanliga verður nevndur slepti í sínari tíð eini blómandi vinnufyritøku fyri at geva út føroyskar bókmentir, serstakliga tær, sum áður vóru komnar, men sum ikki vóru til at fáa hendur á. Hetta virksemi hansara kann ikki yvirmetast. Takkað verið útgávustarvi Emils uppdagaðu nýggj ættarlið teir gomlu bókamentarligu dýrgripir okkara. Men eisini nýggjari fakligar og fagrar bókmentir hevur hann givið út. Vit ynskja the grand old man hjartaliga tillukku. Vit hetta takkargerð og viðurkenning í tøkum tíma og av gerðin tænir eisini landsstýrismanninum í mentamálum til æru.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgmanssetur í Sandavági



MARJUS DAM
Løgtingsmaður

**Fyritreytirnar fyri at gera løgmanssetur í Hoyvík, sum onkur upprunaliga ætlaði, eru burtur. Tað skuldi kostað lítið og onki, men nú kostar tað tíggjutals milliónir. Einasta rætta er at leggja setrið í Sandavági, har setrið var í uml 300 ár**

Tað skuldi kosta nærum onki. Nú skal eitt gamalt hús umvælast og broytast fyri einast 4-5 milliónir. Fornminnissavnið skal flytast annað stað fyri aðrar nógvar milliónir. Sum gongdin tykist vera innan byggivirksemi av hesum slagi hjá tí almenna, skulu teir prísir, ið verða nevndir nú, helst faldast við 2 - 3 fyri at fáa endaligu upphæddina. Løgmanssetrið í Hoyvík fer helst at kosta einar10 milliónir krónur tá avtornar. Harafturat skal flytingin av fornminnissavninum roknast 15-20 mill.

Tað hevði verið rætt at kanna, hvat ein kundi fingið eitt løgmanssetur fyri í Sandavági.

- Grundarøki er relativt bíligt.
- Nóg mikið av øki er til.
- Staðurin er vakur og søguligur.
- Onki er at ivast í, at hugskotið at gera eitt løgmanssetur í Sandavági er eitt frambrot, har ein fær nakað fyri peningin. Tá bygdaráðið í Sandavági hevur bjóðað bygdina fram til setrið, tykist sera hugstoytt, at hugskotið verður tagt í hel, heldur enn at tilboðið og møguleikarnir verða kannaðir nærri. Løgmanssetrið lá í Sandavági í eini 300 ár, tá tað tók dagar at ferðast til Tinganes. At Løgmanssetrið aftur eigur at verða lagt í Sandavági, nú bert ½ tími er til Tinganes, man ongin ivi vera í. Og onki er heldur at ivast í, at har fæst mest løgmanssetur fyri pengarnar.

Eg haldi, at løgmanssetrið skal leggjast í søguliga Sandavág – har tað hevur ligið í fleiri hundrað ár.

# Er jólamaðurin til?



SJÚRÐUR SKAALE

**Nei. Og tað er sjálvsavgerðarrætturin heldur ikki**

Í 2004 gav Norðuratlantsbólkurin út bókina »The Right To National Self Determination - The Faroe Islands and Greenland«. (»Sjálvsavgerðarrættin - Føroyar og Grønland«).

Í hesum sambandi fóru seks av teimum, sum skrivaðu bókina, í oktober 2003 til ST í New York, har vit tosaðu um hugtakið sjálvsavgerðarrætt við leiðarar úr øllum viðkomandi deildunum í ST. Tilsamans átta fundir vóru.

Tann, sum vil vita meira um hetta, kann lesa bókina. Hon lænist á bókasavninum.

Men í stuttum kann hetta sigast: Hugtakið sjálvsavgerðarrættur hevði einaferð heilt greiðan týdning: Lond ella tjóðir, sum høvdu henda rætt, kundu skipa seg um sjálvstøðug ríki, um tað var tað, tey ynsktu.

Í dag, harafturímóti, er týdningurin er útholaður. Og tað er gjørt heilt tilvitað. Statir, sum hava trupulleikar av loysingarrørslum - og teir eru nógvir - hava borið so í bandi, at hugtakið ikki hevur nakran løgfrøðiligan týdning longur.

**Eingi nýggj rættindi**

Tann, sum ger av, hvat hugtakið sjálvsavgerðarrættur merkir í hvørjum einstøkum føri, er tað sonevnda »miðveldið« ella »móðurlandið«. Hjá okkum er tað Danmark.

Um Danmark hevði boðað ST frá, at føroyska tjóðin sum evsti myndugleiki í Føroyum hevur rætt at skipa seg sum sjálvstøðugt land undir altjóða lóg, so hevði tað havt týdning. Tí so høvdu vit havt »sjálvsavgerðarrætt« í klassiskum týdningi.

Men tá Danmark beint fyri nýggjár sendi ta donsku útgávuna av uttanríkispolitisku heimildarlógini til ST og segði, at hetta var í samsvari við sjálvsavgerðarrætt Føroya, so gevur tað ikki Føroyum onnur rættindi enn tey, sum eru staðfest í hesi donsku lóg. Tað merkir also bara, at sjálvsavgerðarrættur Føroya er tann danska útgávan av uttanríkispolitisku heimildarlógini. Hvørki meir ella minni.

**Kongeriget Danmark...**

At hetta skal gera, at »sjálvstýrismálið nú er okkara burturav«, sum løgmaður segði gamlaárskvøld, er ikki beint.

Tað er heldur tvørturímóti. Tí danska lógin staðfestir jú bæði á ein og annan hátt, at Føroyar eru »kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne«. Og sambært skrivinum frá donsku stjórnini til ST, er tað hetta, føroyingar ynskja. Á sjálvari forsíðuni á skrivinum frá donsku stjórnini stendur nevniliga, at danska fólkatingið hevur samtykt ta donsku útgávuna av lógini í semju við føroyskar myndugleikar.

Og tað er púra rætt. Samgongan tók jú undir við, at danska lógin varð samtykt.

Og nú eru boðini so farin um allan heim: Føroya fólk hevur einki annað ynski enn at vera ein undirskipaður partur av Danmark.

At ein føroysk útgáva av heimildarlógini eisini varð samtykt í Føroyum, hevur ongan sum helst týdning í hesum sambandi. Eingin veit, at hon er til...

**Tað finst eingin rættur**

Bæði Eidesgaard og Hoydal tosa sum um, at sjálvsavgerðarrætturin er ein greitt defineraður rættur. Tað er skeivt. Í altjóða lóg finst eingin sjálvsavgerðarrættur í dag. Ta finst bara tann rættur, sum statir velja at geva sínum undirskipaðu eindum.

Um Danmark gevur føroyingum henda rætt fæst ikki at síggja, fyrr enn ein greiður og áhaldandi meiriluti í Føroyum ynskir, at vit skulu skipa okkum sum eitt sjálvstøðugt land.

Tí eisini tá tann meirilutin er til staðar, verða tað danskir myndugleikar, sum fara at hava síðsta orðið. Einki gerst uttan semju við Danmark. Soleiðis er skipanin. Danmark setir treytirnar, tá samráðst verður. Og ikki fyrr enn Danmark hevur boðað ST frá úrslitinum, er tað galdandi.

Men í so máta mann Danmark ikki vera tað ringasta landið at hoyra til. Tí hóast Danmark sjálvsagt við politiskum snildum (t.d. við nýggju fráboðanini til ST) vil halda Føroyar innangarðs, so fingu vit loysingina, um vit veruliga vildu hava hana. Tað vilja vit ikki. Og tá so er, er enn meiri akademiskt at tosa um sjálvsavgerðarrætt...


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.